# Rimmar Beatles-kvøld á Rex

**The Mersey Beatles, sum allir eru úr Liverpool, fara fríggjakvøldið at spæla á Rex í Havn. Teir teljast millum bestu »Beatles-tribute« yvirhøvur, og hava eitt nú verið at sæð live á BBC**


Í BÝIN
*Jákup Mørk*


Hóast tað sjálvandi ikki ber til at savna the Fab Four aftur, so eru tó túsundtals tónleikarar kring allan heimin, sum enn halda tónleiki teirra á lívi.

Nakrir av hesum hava eisini gjørt tað til sítt livibreyð at spæla sangir hjá Beatles – og bara hjá Beatles, og the Mersey Beatles er so ein av hesum bólkum.

Í mun til aðrar bólkar, so hava hesir tann fyrimun, at teir eru nakað nærri ektaðu vøruni. Teir eru nevnliga úr sama øki í Liverpool, har beatlarnir komu fram á sinni, og tað er einki at ivast í, at tað er haðani, at stóri áhugin hjá teimum Beatlunum, sum nú vitja, er íkomin.

### Kring knøttin

Í 1998 byrjaðu hesir fýra fýrarnir at spæla saman, og tað vardi heldur ikki leingi, áðrenn fólk av álvara varnaðust, at her búði nakað heilt serligt. Teir tóku lut í árliga »Liverpool Beatles Festival« í 1999. Ein festivalur, sum verður varpaðar kring stóran part av heiminum.

Fyriskiparar kring allan heimin fingu eyguni upp fyri, hvat the Mersey Beatles stóðu fyri, og heilt skjótt var ordrabókin fylt á tremur við fyrispurningum úr øllum heraldshornum. Ikki minst á støðum, har the Beatles upprunaliga hava spælt. Og eitt nú eru teir tað fyrsta sonevnda »Beatles-tribute«, sum hevur spælt í Kroatia. Cavern Club í Liverpool slapp eisini upp á listan hjá teimum á heysti 2001, tá hátíðarhald var fyri deyða George Harrison, og hetta gjørdu teir somikið sannførandi, at teir vórðu bidnir um at koma aftur á staðið, tá sami George skuldi havt føðingardag í november 2002.



*Tað er einki at fara skeivur í, at tað eru The Beatles, sum tað heila snýr seg um, tá hesir fýra fara á pallin fríggjakvøldið*

### Í forsølu

Plássið á hesari síðu er ov lítið til at reksa upp øll tey støð, har hesir beatlarnir hava framført tónleikin. Men eftir eitt nú hava umboðað Liverpool á ferðavinnustevnu í Fraklandi. Eftir at hava framført live fyri fleiri enn 40.000 áskoðarum í Liverpool og eftir at hava verið live á BBC, verður tað nú á Rex, at teir skulu á pall.

Tað verður so fríggjakvøldið, og so ræður um at vissa sær atgongumerki í góðari tíð. Hesi kunnu keypast á Kunningarstovuni í Havn, og – um nakað er eftir til ta tíð - við dyrnar á Rex fríggjakvøldið


www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

chill out
lounge



**Fríggjakvøldið og Leygarkvøldið**
Komi 5 fólk samstundis
áðrenn klokkan 24, og tit
fáa eitt gávukort á 800 kr.

**Fríggjakvøldið 04. mars**
Chill Out Lounge
**DJ spælir góðan RnB tónleik**
Ovara hædd
**Diskotek við Rúna Kjær**

**Leygarkvøldið 05. mars**
Chill Out Lounge
**DJ spælir góðan RnB tónleik**
Ovara hædd
**Diskotek við Rúna Kjær**

eclipse
night club

Vikumenu

Forrættur
Eksotisk rækjublanding, borðreidd á ananas, við karrydressing og lime

Høvuðsrættur
Steak av oksaháryggi, borðreidd við tomat Bearnaise og grillaðum asparges

Dessert
Græskar terta við kanel ísi, ribs coulis og frískari frukt

**Høvuðsrættur Kr. 158,-**
**2 rættir Kr. 218,-**
**3 rættir Kr. 268,-**

RESTAURANT
MERLOT
MAGNUS HEINASONARGØTA 20
BORÐBÍLEGGING Á TEL 31 11 21

Sosialurin 341800